# Kjak

**Bergtóra, Bjørt, Annita og Eyðgunn,**
*løgtingskvinnur*
**Annika, Rósa og Helena,**
*landsstýriskvinnur*

## Eitt stig fram, og sjey fet aftur

Tað undirgrevur alt álit á okkara lóggevandi vald, um Løgtingið í hvørjari tingsetu broytir valskipanina, uttan grundleggjandi fyrireiking og viðgerð av fyrimunum og vansum við broyttari skipan.

Sjey valdømi tryggjar økiskvotering, men søgan vísir okkum púra greitt, at henda valskipan er ein stór forðing fyri at fáa fleiri kvinnur valdar í Løgtingið. Vit halda ikki, at valskipanin frá 1852, tá landið varð skipað í sjey valdømi, er hóskandi fyri eitt nútímans Føroyar!

Vit liggja framvegis í allar aftastu røð, tá ræður um javnstøðu í okkara fólkavalda parlamenti, sammet við flestu lond í heiminum. Við valið í 2004 vórðu einans 3 av 32 valdum løgtingslimum kvinnur. Tá farið varð yvir til eitt valdømi, vaks talið til 7 av 33. Tað vísir, at hóast langt er á mál, so var eitt valdømi eitt stórt framstig í mun til at fáa meira demokratiska umboðan av báðum kynum.

**_Sjey valdømi forðar fyri at fáa fleiri kvinnur valdar í Løgtingið._**

Vit taka undir við Demokratiu, tá nevndin m.a. sigur: »Málið um, hvørt valskipanin skal broytast aftur og hvussu, er ógvuliga komplekst og er eftir okkara tykki langt frá nóg væl lýst og búgvið til endaliga støðutakan, sum nú er. Ein endurskoðan av vallógini eigur ikki bara at snúgva seg um eitt ella fleiri valdømi ella ymsar tekniskar útrokningar í tí sambandinum, men eisini um, hvussu ein so jøvn og demokratisk umboðan sum møguligt best verður tryggjað, t.d. kyn, aldur, geografisk umboðan og fíggjarlig styrki.«

Atkvøðutølini frá seinasta løgtingsvali vísa greitt, at atkvøðurnar í sera stóran mun flyta seg tvørturum tey gomlu mørkini fyri valdømum. Og, at stórur partur av atkvøðunum í miðstaðarøkinum fara til valevni uttan fyri høvuðsstaðin. Hetta kann gera tað lættari hjá kvinnum og nýggjum valevnum, sum eftir gomlu skipanini høvdu sera trupult við at sleppa framat, at blíva vald. Eisini bendir hetta á, at fólkið ynskir at hava møguleikan at velja ímillum valevni frá øllum landinum.

Vit vóna, at Løgtingið til 3. viðgerð heldur fast við eitt stig fram, heldur enn at stíga sjey fet aftur.



**Jógvan Olsen**
*havnemand@gmail.com*

## Bummgjald

Endiliga kom kjak um møguleikan at leggja nýtslugjald á vegakervið.

Tað skuldi verið sjálvsagt, at tað rætta er, at lata fólk gjalda fyri at koyra á vegunum. Teir hava verið dýrir at gera og kosta nógv í viðlíkahaldi. Harafturat skulu teir javnt og samt uppgraderast; tann uppgávan verður aldrin liðug og kostar eisini nógv.

Optimali hátturin at leggja gjald á man vera við onkrari GNSS-baseraðari skipan (Global Navigation Satellite System, til dømis GPS). Onkur tílík skipan sigst at vera framleidd, til dømis hjá Skymeter Corporation. Við eini slíkari gerst møguligt hjá kommunum at leggja ymisk gjøld á, alt eftir hvar, koyrt verður – um kommunan ynskir tað. Land og kommunur kunnu so brúka somu skipan, men á ymsan hátt.

Tó, ein GNSS-baserað road pricing-skipan man vera dýr at fáa í gongd, men kann so eisini brúkast til ymiskt annað, til dømis parkeringsgjald.

Vit hava longu tøkniliga grundarlagið fyri eini einfaldari gjaldsskipan: gjaldsstøðirnar í undirsjóvartunlunum. Hesar kunnu tó illa brúkast innan fyri kommunumørk. Vegakervið er ov komplekst. Tær kunnu kortini brúkast á landsvegakervinum. Landsvegakervið verður býtt upp í strekkir við einum 3-5 smærri bygdum á hvørjum strekki, og størri plássini fyri seg. At koyra inn á eitt ávíst strekki eigur at kosta í mun til, millum annað, hvussu nógvir og langir tunlar eru á strekkinum. Um einkultu strekkini ikki eru ov long, koma mestsum øll, sum brúka vegakervið, at gjalda sín part. Bert tey, sum koyra stutt strekkir millum smærri bygdir sleppa undan. Hetta er munandi betur enn núverandi skipanin, har øll gjalda uttan mun til, um tey brúka vegakervið nógv ella als ikki.

Núverandi ófrívilliga »flat rate«-gjaldsskipanin leggur upp til, at fólk brúka vegakervið óansæð, um tað veruliga lønar seg hjá teimum ella samfelagnum.

Men ein skipan við gjaldstøðum kann illa brúkast inni í býunum. Um tað er ov dýrt at gera eina fullfíggjaða road pricing-skipan, kann ein kommuna í staðin leggja gjald á parkeringina í og í nánd av miðdeplum í býnum. Øll vanlig parkering eigur at vera gjørd til gjaldsparkering. Øll onnur parkering verður tíðaravmarkað, til dømis til eitt korter ella minni. Undantikið kann vera av- og áskipan. Sum undantak til hesi bæði sløgini av parkering, eigur at vera møguligt at langtíðarleiga ein parkeringsbás í nánd av egnum bústaði, um ikki ber til at hava parkering á egnari grund. Parallelt skulu virkir kunna leiga básar til arbeiðsbilar.

Verður so eisini forðað fyri gjøgnumkoyring í centralum økjum, er sloppið undan nógv tí mesta av óneyðugu ferðsluni. Á strategiskum støðum kann verða ásett, at bert bussar og hýruvognar sleppa gjøgnum – og sjálvsagt neyðsendarkoyring. Hesi støðini eiga at vera markaði við onkrum designi, sum er tað sama á øllum støðunum.

Kanska tað kortini er bíligari í longdini at fáa eina fullfíggjaða, satellit-baseraða skipan?



**Eyðgunn Samuelsen**
*løgtingskvinna Javnaðarflokkurin*

## Fíggjarkarmar 2011 – vit og skil vann frama

*Nógvar hólmgongur hava verið seinastu tíðina í samband við, at løgtingið skal áseta ein fíggjarkarm fyri 2011 og komandi 5 árini.*

Øll vita, at vit hava ovurstóra almenna skuld. Nógv fokus hevur verið á, hvussu vit skuldu fáa tamarhald á skuldini og fáa samfelagið aftur á beint. Summi hava vilja kutað allar vælferðartænastur niður, meðan onnur hava ført fram, at tað ber til at varðveita okkara vælferð og minka um skuldina samstundis.

Munurin er framferðarhátturin, og hvussu tú sær uppá samfelagið. Sær tú samfelagið sum nakað, ið skal vera sum tað er og sum tú ikki skal gera nakað við, ja so er einasti møguleikin at kuta vælferðina burtur og frysta samfelagið niður. Tá kan tú bert vóna, at tá tú tinar tað uppaftur, eru trupuleikarnir loystir av sær sjálvum.

Hin leiðin er at síggja samfelagið sum nakað, ið vit kunnu gera nakað við. At til ber tilvitað at taka nakrar avgerðir, og á tann hátt sjálvi loysa okkara trupulleikar. Tað ber til at skapa karmar, so inntøkurnar í samfelagnum, ikki minst frá okkara høvuðsvinnu, aftur fara at vaksa. Tað ber til, at endurskoða almennu tænasturnar og umskipa tær so hvør króna verður brúkt á besta hátt.

**_Tað ber til at skapa karmar, so inntøkurnar í samfelagnum, ikki minst frá okkara høvuðsvinnu, aftur fara at vaksa. Tað ber til, at endurskoða almennu tænasturnar og umskipa tær so hvør króna verður brúkt á besta hátt._**

Tað er henda seinna vegin, ið ein meiriluti í fíggjarnevndini samdist um at ganga. At vit sjálvi tilvitað skapa karmarnar fyri okkara samfelag og stýra gongdini, heldur enn at lata gongdina stýra okkum. Tað er ein stór avbjóðing at fáa fíggjarkarmarnar fyri 2011 at halda, men halda vit á við at nýta vit og skil, so megna vit eisini hesa avbjóðingina.